Fylgiskjal 1

Til UVMR,

Takk fyri høvi at viðmerkja uppskot til til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum

Tað framgongur av uppskotinum at endamálið við broytingaruppskotinum er at tann peningur sum er settur av til umhvørvisárinskanningar í samband við kolvetnisvirksemi nú skal kunna nýtast til at gera kanningar í undirgrundini í samband við grøna orkuskiftið.

Umhvørvisstovan heldur tað vera skilagott at hesin peningur verður raðfestur til grøna orkuskiftið, men vit vilja fegin skjóta upp at orðingin verður víðkað til at fevna um sjálvan havbotnin og ovastu metrarnar undir botninum. T.d.:

Kanningar og kortlegging av havbotni og undirgrund í samband við útbygging av varandi orkukeldum á føroyskum sjóøki

Vinaliga heilsan

Sigurð í Jákupsstovu

Umhvørvisstovan

Stjóri

Postboks 2048

FO-165 Argir

Føroyar

tlf.: +298 342488

email: Sigurdj@us.fo

web: www.us.fo

 Hugsa um umhvørvið áðrenn hesin t-postur verður skrivaður út

Think about the environment before printing this email

Fra: Annika Petersen <AnnikaP@uvmr.fo>

Sendt: 19. december 2023 14:04

Til: Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; us <us@us.fo>; Jarðfeingi - Postur <Jardfeingi@jardfeingi.fo>

Cc: Ragnfríð Nord Anthoniussen <RagnfridNordA@uvmr.fo>; Herálvur Joensen <HeralvurJ@uvmr.fo>

Emne: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum

(peningur til jarðfrøðiligar kanningar) verður hervið sent tykkum til hoyringar.

Hoyringarfreistin er sett til týsdagin 16. januar 2024.

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga

Annika Petersen

Uttanríkis- og vinnumálaráðið.